# Kia Carnival - facelift og munandi størri dieselmotor




*Pól Jensen í Auto fekk tann fyrsta Kia Carnival í nýggju útgávuni við 144 hk dieselmotorinum. Hann er sera væl nøgdur við bilin, ið er ein rúmligur og kvikur hýruvognur.*

**Kia eru komnir á marknaðin við Carnival í nýggjari útgávu. Síðan teir fyrstu Carnival komu higar í 1999, hava teir verið væl móttiknir, bæði til stórar familjur og sum hýruvognar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Kia Carnival er nakað broyttur bæði uttan og innan. Bilurin er framvegis ein av størstu MPV bilum á marknaðinum. Eisini hevur hann nú fingið ein tann størsta commonrail dieselmotorin í sínum klassa, talan er um 2.9 litur motorin við 144 hk. Samstundis er motorurin vorðin munandi meira ljóðleysur.

### Alt nýtt innan

Størstu broytingarnar eru innan. Instrumentborðið er heilt nýtt við træpanelum og alu-look tilfari. Setrini eru nýggj og alt er annars er gjørt í betri kvaliteti. Har eru heili 3 handskarrúm og nokk av plássi at leggja lutir frá sær á. Man kann ganga ímillum øll setrini uttan at skula út úr bilinum. Sum nakað nýtt kunnu øll tey aftaru setrini takast úr bilinum í eini handavending.

## Kia Carnival 2.9 TDI LX

Motorurin: 4 syl. 2.9 litur 144 hk
Turbodiesel /common-rail innspræning

| | |
|---|---|
| 0-100 km/t | 15,2 sek. |
| Oljunýtsla | 12,2 km/l |
| Dekkstødd | 215/65-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 492,5 cm |
| Breidd | 190,0 cm |
| Hædd | 180,5 cm |
| Eginvekt | 1975 kg |
| Prísur (7 persónar) | Kr. 255.800 |
| (vørubilur) | Kr. 216.800 |
| Met.lakk/Svart v.klárlakk | + 3.000 |
| Søluumboð | P/f D.B. Bilar<br>J. Bronckgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel.310600 |



*Kia Carnival í camping útgávu. Takið kann lyftast upp, so til ber at ganga upprættur inni í bilinum.*

# Kia Carnival í camping útgávu

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Carnival verður eisini gjørdur í eini camping útgávu við soviplássi til 4 vaksin fólk. Takið kann lyftast upp, so til ber at ganga upprættur inni í bilinum, tá songin ikki er í brúk. Bilurin hevur køk við skápum, vaski og kókiblussi. Eisini eru tangar til bæði reint vatn og frárensluvatn, eins og 12V stikk til køliboks.





*Birgir Kruse, mentanarjournalistur, hugleiðir um bilin, um frælsi, um yrking hjá Johannes V. Jensen – og um enska bilin, »Jensen«*

Teksturin er parafrasa yvir yrkingina hjá Johannes V. Jensen frá 1906"Á støðini í Memphis", sum Gunnar Hoydal umsetti í bókini "Nýbrotið í norðurlendskum bókmentum" (Sprotin 1994). Jensen er harafturat bretskt bilamerki, sum kendast var 1966-71 við modellum sum FF (Ferguson Formula) og Interceptor. Ein bláan bil av hesum slagi nýtti Simon Dutton í leiklutinum sum Simon Templar í sjónvarpsrøðini "The Saint". Í 60'unum hevði Roger Moore henda leiklut og nýtti tá ein hvítan Volvo 1800. Seinni er biografilmur gjørdur við Val Kilmer, sum koyrir í einum reyðum VolvoC70 Turbo Coupe

# » – Syng, Jensen…«

PARAFASA
*Birgir Kruse*

Einki er sum at seta seg við rattið á einum snøggum, nýggjum bili. Lukta alt tað nýggja, leður og nýpussað stás, sum ein farri av svørtum skókremi og sunnudagsreingerð hongur uppi við. Kenna, at eingin hevur verið her fyrr, taka um rattið og so strúka avstað. Út í náttúruna, út í bláan. Guðs skaptu fríu náttúru. Innan sólin er risin.

Fram í dal meðan tjøldrini láta, og áin vaknar móti degnum. Gjøgnum niðurrullaða rútin hoyra mýrisnípu í tí fjara, meðan breiðu dekkini spræna grús, kloyva tøgnina og eta vegin. Framá við svongd og við ferð. Sjóleysur um onkra túgvu, ið so snildisliga ger henda vegin til hin mest spennandi í landinum at koyra á. Smalur, krókutur, heyggjutur.

### Bilur og frælsið

Í strúkandi summarlotinum má eg í fyrstu atløgu sanna, at bert í bilinum er frælsi. Hann er frælsi hins einstaka, bilurin. Frávalið av tí kollektiva. Frælsið hins egna, gjørt ítøkiligt og sett á fýra hjól.

Hevur tú bilin, bensinið og vegin, so er hetta ímyndin av persónligum frælsi. Eitt scenario, sum tey siga. Har tú sjálvur førir pensilin. Koyr hagar tú vilt, so sum tú vilt, og tá ið tú vilt. Bilurin er hin fullkomna frælsismaskinan. Stórsta undur, síðani hjólið varð uppfunnið.

### Burtur í bili

Koyr avstað frá øllum trupulleikum, lat tónleikin ganga og slepp øllum. Lat bilin ríva teg burtur. Burtur hiðan.

Spenn teg niður í leðursetrið, tak fast um rattið. Kenn, hvussu smáu knillingarnar frá italsku dekkunum, í fulkomnum samljóði við vegjaðaran, ið syngur seg sitrandi upp í rattið, kennast aftur í væl fjarðaða Maserati sniðnum, meðan Neil Young kvøður um passión. Are you passionate.

Tak um tað, rattið og lat Jeremy Clarkson og allar hansara toppgearaðu bilar renna fyri eyguni. AC Cobra, TVR, Ferrari F50, Aston Martin, nei einki er sum ein Jensen. Í samfeldum lovsangi fevna vit vaknandi náttúruna, har framrúturin er løriftið, reinvaskað í widescreen surround.

### Jensen gongur aftur

Støðgi við løkin, ið liggur sum Mississippi, at rinda møðina. Skoði bilin, henda velduga kropp, sum stendur og sjóðar og bjálvar seg í føroyskari grønsku, summari og náttúru.

Kenni ein óunniligan anda sveima framvið. Hann kenst nærri og trýnur úr einum miðaldarligum Kurosawa-filmi og ristir við krókutum stavum sítt navn í sandin við løkin. Er tað Simon Templar, ið vil hava heilagaða Saint bilin aftur? Nei, Jensen og Memphis eru stavirnir eg kann lesa. Men so strikar hann út, ókunnumaðurin, vendir sær burt og rópar "Ver eftir, títt lív er kortini einki, ver eftir!".

Hvør var hann, andin, ið støðgaði eitt bil frammi í dal?

Tá loysnar himinin, blámin brestur og hann oysir niður. Saman halda vit leiðina fram undir gapandi slúsum av regni. Jensen og eg.




